# Fiskimálaráðið

Dagfesting: 29-09-2021
Mál nr.: 21/17886-1

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um treytir fyri fiskiloyvi 5 A og 5 B og reglur um býtið av fiskidagatalinum hjá bólki 5, útróðrarbátar undir 15 tons**
(Broyttar treytir til fiskiloyvi 5 A)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 76 frá 22. mai 2019 um treytir fyri fiskiloyvi 5 A og 5 B og reglur um býtið av fiskidagatalinum hjá bólki 5, útróðrarbátar undir 15 tons, sum broytt við kunngerð nr. 217 frá 22. desember 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Inngangurin verður orðaður soleiðis: "Við heimild í § 19, stk. 2 í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 185 frá 18. desember 2020, verður ásett:"

**2.** Í § 1 verður "§ 74, stk. 1, nr. 6 í løgtingslógini" broytt til: "§ 18, stk. 1, nr. 5."

**3.** § 2 verður orðað soleiðis:

"**§ 2.** Fiskiloyvi 5 A kann eftir umsókn verða latið eigara av fiskifari við fiskidøgum í bólki 5, um eigarin við fiskifarinum, álmanakkaárið fyri, hevur avreitt fyri minst kr. 400.000."

**4.** § 3 verður orðað soleiðis:

"**§ 3.** Fiskiloyvi 5 B kann eftir umsókn verða latið eigara av fiskifari við fiskidøgum í bólki 5, um treytirnar sambært § 2 ikki eru loknar."

**5.** Í § 4 verður: ", stk. 1, nr. 1," strikað.

**6.** Í § 5, stk. 3 verða: ", tó undantikið § 2, stk. 1, nr. 2 og stk. 2-5, sum koma í gildi 1. januar 2022", strikað.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2022.

Fiskimálaráðið, dagfesting

**Jacob Vestergaard**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert